# Johan Dahl má í kassan eftir peningi

**Tað ber ikki til at fáa eina endaliga loysn á teknisku trupulleikunum við Smyrli fyrrenn landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur útvegað neyðuga fíggingina til endamálið**

SMYRIL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú má Johan Dahl í kassan eftir pengum.

Skal tað eydnast at fáa Smyril í dokk at fáa eina endaliga loysn á teimum teknisku trupulleikunum, er fyrsta treytin, at Johan Dahl fær sannført samgonguna og Løgtingið annars um, at tað er neyðugt at játta pengar til endamálið.

Og tað verður helst ikki heilt lítlar upphæddir, talan er um.

Landsstýrismaðurin hevur fingið at vita fra Strandferðsluni, at leyðsliga mett fer tað at kosta 11-13 milliónir at fáa endaliga bilbukt við teimum teknisku trupulleikunum, sum hava plágað Smyril við millumbilum heilt síðani hann kom til landið og sum hava loypt ótryggleika á ferðafólk.

Higartil er alt gjørt fyri at minka so nógv um vandan fyri tekniskum trupulleikum so nógv sum gjørligt.

Men ein endalig loysn fæst ikki fyrrenn Smyril sleppur í dokk, har ein nýggj skipan skal setast til, sum fær ein enda á trupulleikunum einaferð fyri alla tíð.

Ætlanin var ikki, at Smyril skuldi í dokk fyrrenn í 2011, men tann ætlanin varð síðani framskundað til í oktober næsta ár.

Í kjalarvørrinum á seinasta tekniska brekinum týskvøldið, tá ið hann misti framdriftina í ruskveðri beint eystur úr Nípuni við Trongisvágsfjørð, verður nú enn einaferð roynt at framskunda dokkingina so at hann kann sleppa í dokk longu í vár.



*Enn er óvist nær Smyril sleppur í dokk at loysa teir teknisku trupulleikarnar einaferð fyri alla tíð. Strandferðslan fær onki gjørt, fyrrenn Løgtingið hevur játtað neyðuga peningin til endmálið*

## Noyðist at bíða

Men Conrad Gaard Joensen, rakstrarleiðari á Strandferðsluni staðfestir, at ongi stig kunnu takast til nakra dokking fyrrenn Løgtingið hevur játtað Strandferðsluni neyðugu játtanina til endamálið.

Hann, at Strandferðsluni hevur skannað marknaðin fyri at finna eitt at hóskandi avloysaraskip.

Men higartil hevur tað ligið í kortunum, at Smyril skuldi í dokk um eitt ár, ella í oktober næsta ár

- Og skal tann ætlanin halda, er tað enn alt ov tíðliga at leita eftir avloysaraskipi nú, tí ongin reiðari kann longu nú binda seg til at leiga okkum eitt avloysaraskip í einar fimm ella seks vikur so langt frammi í tíðini.

- Nú liggur so í kortunum, at Smyril skal í dokk í vár, men Strandferðslan kann ikki av álvara leita eftir hvørki skipi ella dokk, fyrrenn pengarnir eru játtaðir til endamálið.

Les eisini grein á síðu níggju, har Johan Dahl sigur, at hann fer at skunda sæt at útvega pening, so at Smyril sleppur í dokk sum skjótast.

Roknskaparserfrøðingur til Posta

Roknskaparserfrøðingur við hegni til tøkni

Sum partur av framhaldandi virkismenningini á Posta, leita vit eftir einum persóni til at mynda framhaldandi menningina av okkara fíggjarstýringsskipan. Vit nýta fíggjarstýringsskipanina Microsoft Dynamics Nav, og eru í løtuni á versión 4.0.

Roknskaparserfrøðingurin fær tilvísing til fíggjarstjóra felagsins.

Uppgávur
Høvuðsuppgávan verður at menna okkara grundarlag fyri búskaparstýring og rapportering, at útvega analysur og líknandi framhyggjandi tilfar til stjórn felagsins.

Ein partur av menningararbeiðinum verður at smidliggera og effektivisera arbeiðshættirnar í fíggjarligu umsiting felagsins.

Tú
Tú hevur drúgvar royndir frá Navision umhvørvi og hevur gjøgnum praktiskar royndir bygt upp eina greiða fatan av, hvussu mest fæst burturúr Microsoft Dynamics Nav.

Tú kanst vísa á ítøkilig úrslit frá líknandi starvi. Tað er títt eyðkenni, at tú ert ágrýtin og røkkur teimum málum, tú setur tær. Tú sært møguleikar heldur enn forðingar, og tín arbeiðsháttur er miðvísur og vælskipaður.

Vit rokna við, at tú hevur roknskaparútbúgving sum til dømis HD, Cand Merc ella líknandi.

Vit bjóða
Vit bjóða tær eitt sera spennandi og fjøltáttað starv í einum jaligum umhvørvi við kappingarførari løn, góðum setanartreytum og sjálvstøðugum arbeiðsøki.

Útbúgvingarmøguleikar og neyðug skeið er ein sjálvfylgja, eins og tú fært ávirkan á, hvussu starvið verður bygt upp.

Umsókn
Umsóknir vit avritum av viðkomandi skjølum skulu sendast til:

Posta
Att: Starvsfólkadeildin
Óðinshædd 2
100 Tórshavn
posta@posta.fo

og vera okkum í hendi skjótast til ber og í seinasta lagi hin **10.12.09**

Spurningar
Spurningar um starvið kunnu setast Vivi Egholm, fíggjarstjóra, á tel. 21 31 93

Stutt um Posta
Uml. 250 fólk starvast hjá Posta. Hin 1. januar 2005 varð postverkið umskipað frá almennum stovni til partafelag við Føroya Landsstýri sum eigara.
Høvuðsskrivstovan, miðdepilin fyri alt virksemi felagsins, er á Óðinshædd í Tórshavn.

Posta